# Norðbil 25 ár




*Í hesum døgum eru 25 ár liðin síðan Norðbil læt upp í nýggjum virkisbygningi við Oyggjarvegin*



*Her er bygningurin við Oyggjarvegin spildurnýggjur*

**Bilasølan Norðbil kann í hesum døgum hátíðarhalda, at 25 ár eru liðin síðan flutt varð inn í nýggjan virkisbygning við Oyggjarvegin**

BILASØLA

Hóast tað eru 25 ár síðan fyritøkan hjá Martini Dam Jacobsen skifti navn til Norðbil, eru yvir 40 ár síðan fyritøkan varð sett á stovn. Tað var síðst í 60-unum at Martin, sum hevði lært til bilmekanikara á verkstaðnum hjá P/F Vilhelm Nielsen í Jónas Broncksgøtu, byrjaði at selja BMW bilar í húsum sínum í Hornabø.

Eftir tað fekk hann fyrst í 70-unum eisini umboð fyri Skoda og Honda. Við bilasølu, verkstaði og eykalutagoymslu helt fyritøkan til í Hornabø til 1984, tá flutt varð inn í nýggja bygningin við Oyggjarvegin.

Norðbil eigur eisini bilasøluna Nordcar í Smiðjugerði saman við Jens Peturi Jensen og Jákupi Klein Olsen. Í dag selur Norðbil bilmerkini: Honda, Hyundai og Skoda, meðan Nordcar selur BMW, Fiat og Mini.

Annað ættarlið hevur tikið yvir. Tað eru brøðurnir Birgir og Frits Dam Jacobsen, sum í dag hava dagligu leiðsluna av Norðbil. Í sambandi við 25 ára hátíðarhaldið hava Norðbil nógv góð tilboð við bæði nýggjum og brúktum bilum.

**mg**




*Martin Dam Jacobsen saman við synunum Frits og Birgir Dam Jacobsen, sum hava dagligu leiðsluna av Norðbil*



*Fyrsti BMW bilurin hjá Martin Dam Jacobsen, ein BMW Isetta 300. Aftan fyri bilin sæst ein Volvo PV hjá Martini. Eisini sæst Bergur Danielsen, sum lærdi til bilmekanikara hjá Martin, við sínum reyða Austin 1100 við sólskermi yvir forrútinum og ljóskastara á takinum. Myndin er tikin í Hornabø í 60-unum*



*Eiler Johannesen til arbeiðis á høvuðssætinum hjá BMW, Honda og Skoda í Hornabø*